Heini O. Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins:

# Kunnu ikki noyða nakran á ting

**Heini O. Heinesen hevur ikki stórvegis viðmerkingar til ábreiðslurnar hjá Finni Helmsdal í Degi og viku fríggjakvøldið. Hann sigur seg skilja væl Finn Helmsdal, um hann velur arbeiðið á Føroya Barnaheimi og í Tórhavnar Býráð heldur enn tingarbeiðið. Finnur Helmsdal hevði mánamorgunin onga viðmerking til spurningin um hann hevur tikið eina endaliga støðu um hann fer á ting**

NÝGGI TINGMAÐUR TJÓÐVELDISFLOKSINS
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið í Degi og viku fekk søgan um, hvørt Finnur Helmsdal fer á ting, nýggj bein at ganga á. Finnur Helmsdal førdi fram, at hóast eingin endalig støða er tikin, so hevði hann bestan hug at taka arbeiðið Føroya Barnaheimi og sessin í Tórshavnar Býráð frammum ein møguligan tingsess.

Grundgevingin var, at hann metti seg ikki hava fingið nóg stóran stuðul í Tjóðveldisflokkinum, og at hetta millum annað kom greitt til sjóndar undir valdystinum í fjør. Hann helt seg ikki hava fingið nóg góðar møguleikar sum valevni at føra seg fram undir valdystinum. Avmarkaðu møguleikarnir var møguliga orsøkin til, at hann gjørdist júst ov stuttur at koma á ting.

Finnur Helmsdal vísti eisini á, at hann var sera glaður fyri sítt arbeiði á Føroya Barnaheimi, og at býráðsarbeiðið í Tórshavnar kommunu eisini hevði stóran áhuga. Finnur Helmsdal er eisini næstur í røðini at koma í Tórshavnar Býráð. Hildur Eyðunsdóttir hevur júst sagt sessin frá sær, tí hon er flutt til Íslands í lestrarørindum, og tískil stendur býráðssessurin eisini Finni í boði.

Sosiala økið, sum er hjartamálið hjá Finni, hevur seinastu árini fingið størri og størri rúmd í kommunalum politikki, og hann førdi fram í Degi og viku, at tað var orsøkin til, at arbeiðið sum býráðspolitikkari eisini lá honum nær.



*Heini O. Heinesen hevur ikki stórvegis viðmerkingar til ábreiðslurnar hjá Finni Helmsdal í Degi og viku fríggjakvøldið. Hann sigur seg skilja væl Finn Helmsdal, um hann velur arbeiðið á Føroya Barnaheimi og í Tórhavnar Býráð frammum tingarbeiðið.*
*Mynd: Savnsmynd*

### Ongar avleiðing fyri Finn Helmsdal

Formaðurin í tingbólki Tjóðveldisfloksins, Heini O. Heinesen, vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til ábreiðslurnar hjá Finni Helmsdal í Degi og viku, um at hann ikki fingið nøktandi møguleikar at føra seg fram undir valdystinum í fjør.

Heini O. Heinesen sigur bert, at tað vanliga er ein spurningur um pengar og neyðsemjur í flokkinum, og at tað er als ikki ókent fyribrigdi, at valevni-eisini í øðrum flokkum enn tjóðveldisflokkinum eru ónøgd við teirra avmarkaðu møguleikar undir einum valdysti.

Grundgevingin hjá Finni, at hann í løtuni hevur eitt arbeiðið sum hann er sera fegin um, og at býráðsarbeiðið eisini er áhugavert, skilir Heini O. Heinesen væl.

– Í einari stórari kommunu sum Tórshavnar Kommunu eru nógvar spennandi uppgávur hjá býráðspolitikkarunum, og ikki minst á sosiala økinum, so eg skilji væl grundgevingarnar hjá honum, sigur Heini O. Heinesen.

Spurdur um, hvørja avgerð, hann væntar Finnur Helmsdal fer at taka, svarar tingformaðurin, at tað er sjálvsagt fult upp til hann sjálvan. - Tað fer ikki at fáa nakrar negativar fylgir fyri Finn Helmsdal, um hann avger ikki at taka av tilboðnum, og eg persónliga verði ikki fornermaður við hann, sigur Heini O. Heinesen.

Spurdur um tað er ein trupulleiki í Tjóðveldisflokkinum, at Finnur Helmsdal og Páll á Reynatúgvu rætt og slætt ikki kunnu semjast – og ikki minst, hvussu sosialpolikkurin í flokkinum skal førast, svarar Heini, at tað vilja altíð verða deildar meiningar um ymisk øki í einum flokki, og tað sær hann ikki sum nakran trupulleika, og tað má verða upp til tann einstaka at taka støðu til, um tað er ein trupulleiki fyri flokkin.

Heini O. Heinesen sigur at enda, at tað ber ikki til at noyða nakran á ting. Formaðurin í tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum sigur, at tað vanliga verður tikið fyri givið, at tá ein hevur tikið avgerð um at stilla upp, og ein verður valdur, so tekur ein vanliga við tingsessinum, um hann býðst.

Spurdur um hann í sínari tíð sum tingmaður kennur nakað annað dømi um, at tingmenn ikki hava valt at taka við sessinum, svarar Heini, at tað eru fleiri dømi um. Hann vísir á, at vanliga verður grundgivið fyri, at ein ikki hevur tíð ella at tað ikki liggur fyri, meðan veruliga orsøkin hevur verið at viðkomandi rætt og slætt ikki hevur havt hug til at fara á ting.

### Finnur onga viðmerking

Tá vit hittu Finn Helmsdal á máli mánamorgunin um hann hevði tikið eina endaliga avgerð í málinum, svaraði hann stutt og greitt, at hann hevði onga viðmerking. Nógv kundi tí bent á, at greiða fæst ikki í málinum fyrr enn fríggjadagin, tá Annita á Fríðriksmørk endaliga tekur við sessinum sum Mentamálaráðharri.

Rói Egholm um møguliga tingsessin:

## - Ikki aktuelt enn

**Rói Egholm sigur seg vóna, at Finnur Helmsdal fer á ting, tí hann er næsti varamaður. Um sína egnu støðu vil hann ikki gera stórvegis viðmerkingar til, tí so leingi eingin endalig avgerð fyriliggur, er eingin grund til at tosa um ein møguligan tingsess.**

NÝGGI TINGMAÐUR TJÓÐVELDISFLOKSINS
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Rói Egholm sigur seg vóna, at Finnur Helmsdal tekur við tingsessinum, tí hann er næstur á listanum. Hann vil ikki siga nakað um, hvørt hann tekur av tingsessinum, um hann býðst, tí tað er ikki aktuelt enn, sigur Rói Egholm*

Tekur Finnur Helmsdal ikki við tingsessinum hjá sær, fær næsti maður á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymoy møguleika at fara á ting. Næsti maður eftir Finn Helmsdal er Rói Egholm, sum er eitt óskrivað blað í føroyskum politikki.

Rói Egholm starvast dagliga á Farex, og síðan seinasta mikudag hevur hann verið í Skotlandi í arbeiðsørindum. Rói hevur tískil havt eitt sindur avmarknaðar møguleikar at fylgja við, hvat í løtuni hendir á politiska leikpallinum í Føroyum.

Spurdur, um hann er klárur at taka við tingsessinum, um tað kemur so langt, at Finnur Helmsdal ikki velur at taka av, svarar Rói, at fyri hansara viðkomandi er tað rætt og slætt ikki aktuelt enn. –So leingi eingin endalig avgerð er tikin í málinum, ber ikki til hjá mær at hava nakra støðu, sigur Rói Egholm úr Skotlandi.

Hann sigur seg vóna, at Finnur Helmsdal tekur við sessinum, tí hann er fyrstvaldur, og tí átti hann at tikið av tilboðnum. Spurdur, um hann seinastu dagarnar hevur verið í sambandi við floksleiðsluna í Tjóðveldisflokkinum um, at hann møguliga verður nýggi tingmaður hjá flokkinum, svarar Rói, at hann javnan er í samband við Tjoðveldisflokkin, men júst hetta málið hava partarnir ikki tosað nærri um.



# - Mentanarliga fjølbroytnið ein fyrimunur

**- Uppvøkstur mín í muslimskari mentan á Arabisku Emiratunum hevur lært meg at hugsa meiri í fjølbroytni og nuansum og skilja minnilutabólkar, sigur nýggi irakiski/danski presturin, Patrick De Neergaard, sum sunnudagin varð vígdur í Havnar Kirkju til prestaembætið í Vági**

PRESTAVÍGSLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Við øðrvísi mentanarligu og etnisku bakgrund míni havi eg betri førleika at tillaga meg nýggja umhvørvið, enn um eg ongantíð hevði upplivað nakað øðrvísi enn danska samfelagið, sigur Patrick De Neergaard, sum her stendur millum bisp og føroyskar prestar í Havnar Kirkju sunnumorgunin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vágbingar fáa í framtíðini eitt nýtt andlit at síggja, tí 36 ára gamli presturin, Patrick De Neergaard, er nú vígdur og til reiðar at fara í holt við starvið sum prestur í Vági frá 21. september.

Undir gudstænastu sunnudagin í Havnar Kirkju var innsetan av nýggja prestinum, sum er føddur í Irak og í størstan mun uppvaksin á Arabisku Emiratunum. Kristna familja hansara flutti til Danmarkar, tá Patrick De Neergaard var 14 ára gamal, og í dag er hann danskur statsborgari. Móðir nýggja prestin í Vági er úr Irak, meðan faðirin er dani.

### Gleðiboðskapurin einfalda uppgávan

Patrick De Neergaard er sum vera man fegin um starv sítt í Føroyum, og hevur hann higartil bert positiv og rósandi orð at bera føroyingum.

- Gestablídni er avgjørt eitt orð, eg seti í samband við føroyingar, og higartil hevur blíðskapurin á hesum oyggjum verið ein góð uppliving, sum bert ger útlitini betri fyri eini góðari framtíð í Føroyum, sigur Patrick De Neergaard, tá vit fingu orðið á hann mánamorgunin eftir vígsluna í kirkjuni sunnudagin.

36 ára gamli presturin hevur lokið universitetsútbúgving sína í gudfrøði í Århus, og spurdur, hvat eftir ætlan skal eyðkenna tænastu hansara í Føroyum, er svarið einfalt.

- Eg ætli mær ikki at koma við nøkrum kollveltandi nýggjum men heldur varðveita tær siðvenjur, sum longu eru í Føroyum. Einfalda uppgáva mín er at boða gleðiboðskapin, sigur Patrick De Neergaard.

Hann leggur dent á, at hann ynskir at ogna sær vitan og innlit í føroyskan sið og mentan á átrúnaðarliga økinum fyri á tann hátt at integrerast skjótari og betri í føroyska samfelagið.

- Gjøgnum samtalu, samskifti og samarbeiði er møguleiki hjá mær betri at skilja, hvørji virði eru galdandi í føroyskum trúarlívi, og hetta er ynski mítt, sigur danski/irakiski presturin, sum nú skal vera trúarhirði í Vági.

### Fyrimunur við mentanarligum fjølbroytni

Umframt hetta vísir nýggi presturin á, at øðrvísi mentanarliga og etniska bakgrund hansara er ein fyrimunur í yrkinum.

- Nú eri eg føddur í Irak og uppvaksin á Arabisku Emiratunum, og í barndómi mínum var talan um eitt muslimskt umhvørvi, hóast familja mín er kristin, greiðir Patrick De Neergaard frá.

Hann heldur, at hetta er ein fyrimunur fyri hann á fleiri hættir.

- Fyrst og fremst hevur hetta lært meg at skilja aðrar siðir og givið mær innlit í mentanarligt og átrúnaðarlig fjølbroytni og nuansur, og á henda hátt er lættari at seta seg inn í støðuna hjá einum minnilutabólki, sigur Patrick De Neergaard.

Sambært gudfrøðinginum kann hann eisini nýta pluralistiska og fjøltáttaða mentanarinnlit sítt í Føroyum, tí aftur nú stendur hann andlit til andlit við nýtt umhvørvið og nýggja mentan.

- Við øðrvísi mentanarligu og etnisku bakgrund míni havi eg betri førleika at tillaga meg nýggja umhvørvið í Føroyum, enn um eg ongantíð hevði upplivað nakað øðrvísi enn danska samfelagið, sigur De Neergaard.

### Liberalur

Spurdur, hvat átrúnaðarligt rák hann sum prestur umboðar, ger hann ikki tað stóra burturúr.

- Eg meti meg ikki vera øðrvísi enn aðrir prestar. Eg ynski at varðveita tað góða, sum er í føroyskum trúarlívi, og eg síggi meg sjálvan umboða eina liberala fatan, sigur nýggi presturin í Føroyum.

Hann endurtekur bert einfalda ynski sítt og uppgávu sína at boða gleðiboðskapin og at integrerast í føroyska samfelagið við støði í einum fjølbroyttum baklandi.

### Vildi royna okkurt nýtt

36 ára gamli presturin vísir víðari á, at hann søkti um prestastarvið í Føroyum við ynskinum at royna okkurt øðrvísi.

- Eg helt talan vera um eina spennandi uppgávu, tá eg sá lýsingina í mars ella apríl, og eg kundi tá hugsað mær at fáa nýggjar royndir í nýggjum umhvørvi, vísir Patrick De Neergaard á.

Fimm umsøknir komu um tóma prestasessin í Vági, har allir umsøkjarar vóru danir, og avgerðin fall so á hálva irakan, sum er uppvaksin í muslimskum landið á Arabisku Emiratunum.

Áðrenn loknu útbúgving sína í gudfrøði á lærda háskúlanum í Århus arbeiddi Patrick De Neergaard í heimsumfatandi felagsskapinum Sameindu Tjóðir umboðandi Danmark, og tískil er talan eisini um persón við altjóða royndum og innliti, og er hetta sambært honum ein førleiki og fyrimunur í nýggju uppgávu síni á avbyrgdu oyggjunum í Norðuratlantshavi.

- Eg meti ongan vanda vera við einum mentanarligum samanstoyti av øðrvísi uppruna mínum, men tvørturímóti er hetta ein førleiki, um hann verður nýttur rætt, sigur komandi presturin í Vági sannførdur.

Sunnudagin varð hann so formliga settur í Havnar Kirkju sum prestur í Vági, og fer arbeiði hansara í gongd 21. september. Sostatt tykist talan vera um eina loysn á trupulleikanum í Vágs bygd, sum ikki hevur havt fastan prest í longri tíð.

Danski/irakiski presturin við kristnari bakgrund í muslimskum umhvørvi er sostatt ein heldur øðrvísi innsetan av nýggjum presti í Føroyum, og vónandi hevur nýggi presturin við altjóða royndum og einum fjølbroyttum mentanarligum baklandi nógv at geva íbúgvunum í Vági og í Føroyum.



*Bispur signar her nýggja prestin, Patrick De Neergaard*
*Mynd: Jens Kr. Vang*